LØGTINGIÐ
Løgtingsins umsiting

**12. juni 2019**
**lm. nr. 149/2019**
(at tilskila í svari)

**Løgfrøðiligt upprit í sambandi við løgtingsmál nr. 149/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)**
(Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen hevur tann 10. juni 2020 lagt fram uppskot fyri Løgtingið um broytingar í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin). Uppskotið varð saman við øðrum lógaruppskotum lagt fram sum liður í hjálparpakka 3.

Sum víst á í løgfrøðiligu eftirkanningini, ið varð send til Umhvørvis- og vinnumálaráðið tann 10. juni 2019, og sum eisini varð løgd við sum skjal til løgtingsmálið á heimasíðu Løgtingsins, skuldi Løgtingsins umsiting arbeiða víðari við spurninginum:

- um Løgtingið hevur lóggávuheimild á økinum,
- um Løgtingið í roynd og veru fer at fremja eina lutvísa yvirtøku av økinum: "Heilsumál",
- um Løgtingið ger seg inn á lóggávuheimildina hjá donskum myndugleikum og
- um spurningin, hvørt lógaruppskotið er ella kann vera í stríð við Stýrisskipan Føroya, § 1.

Uppskotið, ið kemur í kjalarvørrinum á COVID-19, hevur til endamáls at forða fyri smittuspjaðing.

Við broytingini fær landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið heimild at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar á matstovum og skeinkingarstøðum. Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at áseta mest loyvda tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri smittuspjaðing. Umframt hetta kann talan eisini gerast um heilt at stongja matstovur og skeinkingarstøð, um støðan við COVID-19 ger tað neyðugt.

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum vísir á í uppskotinum, at ásetingar, sum snúgva seg um at forða fyri smittuspjaðing, eiga at verða ásettar í farsóttarlóggávuni og ikki í føroyskari serlóg.

Eisini verður í uppskotinum víst til, at Lógartænastan í sambandi við lógareftirkanningina av uppskotinum hevði hesa viðmerking:

*Lógartænastan skal [...] viðmerkja, at málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er danskt málsøki (regulerað í epidemilógini). Endamálið við epidemilógini er at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum COVID-19. [...]*

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

*Lógartænastan skal við hesum vísa á, at tað er ivasamt, um tað ber til í eini løgtingslóg at hava ásetingar, sum beinleiðis hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing, soleiðis sum lagt er upp til, av tí at málsøkið er danskt. Harumframt skal viðmerkjast, at tað er ivasamt, um matstovulógin, hvørs endamál yvirskipað er at skipa matstovuvirksemi o.s.fr. í Føroyum, og sum ikki hevur heilsulig ella onnur endamál, er rætta stað at hava eina áseting um at forða fyri smittuspjaðing.*

Hetta uppskotið gevur tí, sum vera man, orsøk til at kanna lóggávuheimildina á økinum nærri.

Uppskotna broyting er gjørd í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember frá 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin), sum sambært viðmerkingunum til upprunauppskotið[1] hevur til endamáls at gera reglurnar um matstovu- og skeinkingarvirksemi einfaldari og meira tíðarhóskandi umframt at gera tað lættari at fara undir hesa vinnu og lættari hjá teimum myndugleikum, sum skulu hava eftirlit við vinnuni, at meta um, hvørt ásettar treytir verða hildnar. Matstovulógin hevur eisini ásetingar, ið skipa upplatingar- og afturlatingartíðir[2].

Løgtingið hevur lóggávuvaldið á økinum, og hevur tískil lóggávuheimild til at regulera og fremja broytingar í matstovulógini, og harvið eisini heimild at áseta avmarkingar fyri matstovur og skeinkingarstøð.

Hinvegin skulu ásetingar, ið snúgva seg um at forða fyri smittuspjaðing regulerast í Anordning nr. 655 frá 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltnginger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020 (Epidemilógin), ið er felagsøki, har lóggávuheimildin ikki liggur í Løgtinginum, sbr. § 1, stk. 2, nr. 7 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, og lista A, nr. 4 í heimastýrislógini.

Sambært § 1 í epidemilógini er endamálið við lógini at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum COVID-19. Harumframt kann epidemikommissiónin, fyri at forða fyri at smitta kemur til Føroyar ella at smitta verður førd út úr Føroyum, seta neyðug tiltøk í verk innanfyri karmarnar av kapittul 3 og 4 í lógini. Kapittul 3 skipar m.a. kjarnuøkið fyri tiltøk, ið epidemikommissiónin kann seta í verk í Føroyum fyri at forða smittuspjaðing, meðan kapittul 4 heimilar tiltøk í sambandi við smittuinnflutning til Føroyar.

Løgtingsins umsiting skal í hesum samanhangi vísa á, at spurningur kann setast við, um uppskotna lógarbroytingin av røttum skal regulerast í matstovulógini ella, um hetta eigur at vera regulerað í epidemilógini.

Tað er tó ikki eintýðugt greitt, um talan er um eitt samanfall av lóggávuheimildum, ella um tað í veruleikanum verður regulerað inni á einum felagsøki. Løgtingsins umsiting heldur tó ongan iva vera um, at talan er um eitt markamót, har spurnartekin kann setast við, hvør hevur lóggávuheimildina av uppskotnu broytingini. Hetta kemur eisini týðiliga til sjóndar í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Við markamót verður hugsað um ymisk málsøki, har ábyrgdarbýtið kann umskarast.

---

[1] Løgtingsmál nr. 70/2018
[2] §§ 17 og 18

Í veruleikanum er ætlanin við hesum lógaruppskoti at fremja broytingar, ið hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing, sum eftir sínum innihaldi og grundarlagi áttu at verið reguleraðar í epidemilógini.

Men ætlaða lógarbroytingin er sett inn í matstovulógina, ið m.a. eisini skipar upplatingar- og afturlatingartíðir, og sum Løgtingið hevur lóggávuheimild yvir, tí talan er um eina føroyska serlóg.

Løgtingsins umsiting metir tó, at hon hevur ikki grundarlag fyri at siga, at hetta ikki kann regulerast í matstovulógini. og hevur Løgtingsins umsiting tí ikki orsøk til at mæla til burturvísing sbrt. Tingskipanini § 57, stk. 1, nr. 1.

Hóast Løgtingsins umsiting framvegis heldur, at tað átti at verið regulerað í epidemilógini og ikki í matstovulógini, ger Løgtingsins umsiting ikki meira við ivamálini, ið vórðu reist undir eftirkanningini av lógaruppskotinum.

**Á Løgtingi, 12. juni 2020**

Johnhard Klettheyggj
stjóri

/

Anna Rein
løgfrøðiligur ráðgevi